# ARBEIÐSUMHVØRVI OG ARBEIÐSSKAÐAR



Sigmund Poulsen

## Arbeiðsumhvørvislógin

Høvuðsreglur um arbeiðsumhvørvi
Arbeiðið, arbeiðsplássið og arbeiðstíðin

## Arbeiðsskaðatryggingarlógin

Tryggingarskylda og málsviðgerð
Endurgjøld

# Arbeiðsumhvørvislógin

Sigmund Poulsen

## LÓG NR. 70 FRÁ 11. MAI 2000 UM ARBEIÐSUMHVØRVI SUM SEINAST BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 168 FRÁ 16. DESEMBER 2021

**ENDAMÁL:**

Endamálið við lógini er, at

1) virka fyri einum tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð er í samljóði við teknisku og sosialu gongdina í samfelagnum,
2) 2) skapa grundarlag fyri, at virkini sjálvi kunnu loysa sínar trygdar- og heilsuspurningar eftir vegleiðing og í samstarvi við feløgini á arbeiðsmarknaðinum og við vegleiðing og undir eftirliti av Arbeiðseftirlitinum.

# Hvat fevnir arbeiðsumhvørvislógin um?

Sigmund Poulsen

## § 2. Henda lóg fevnir um arbeiði, gjørt fyri ein arbeiðsgevara.

**Undantikin eru:**

1) arbeiði í privata húsarhaldi arbeiðsgevarans,
2) arbeiði, sum einans verður avrikað av limum í húsi arbeiðsgevarans, og sum hoyra til húskið, samanber tó § 49, stk. 7.
3) veiða og fiskiskapur,

**Niðanfyrinevndu reglur fevna tó eisini um arbeiði, sum ikki verður gjørt fyri ein arbeiðsgevara, og tey arbeiði, sum nevnd eru í stk. 2, nr. 1-3.**

1) § 16 um fleiri arbeiðsgevarar v.m., sum eru á sama arbeiðsplássi, §§ 26-32 um útvegafyritøkur o.a., um arbeiðstakarar o.a. og § 33 um byggiharrar v.m.,
2) §§ 34-35 um útinnan av arbeiði,
3) §§ 38-39 um tøknilig hjálpartól,
4) §§ 40-41 um evni og tilfar,
5) § 48, stk. 2, um ov ungan aldur, tá tað snýr seg um vandamikið arbeiði

**§ 3.** Lógin hevur bert gildi fyri loftferðsluna, tá talan er um arbeiði á landi.

*Stk. 2.* Lógin hevur bert gildi fyri sjóvinnu og fiskivinnu í niðanfyri nevndu førum:

1) ferming og lossing av skipum, eisini fiskiskipum,
2) 2) arbeiði hjá fyritøkum umborð á skipum, eisini fiskiskipum

# Høvuðsreglur um arbeiðsumhvørvi



**Arbeiðið** skal skipast, leggjast til ættis og gerast soleiðis, at tað við atliti at trygd og heilsu er fult forsvarligt.

Viðurkendar normar og fyrisett mát, ið hava trygdar- ella heilsuligan týdning, skulu fylgjast.

**Arbeiðsplássið** skal vera soleiðis innrættað, at tað lýkur øll trygdar- og heilsulig krøv.
Viðurkendar normar og fyrisett mát, ið hava trygdar- ella heilsuligan týdning, skulu fylgjast.

(landsstýrismaðurin ger við kunngerð av, hvørjir normar galda)

Lógasavn (logir.fo)

# Høvuðsreglur um arbeiðsumhvørvi

Sigmund Poulsen

**Arbeiðstíðin** skal skipast soleiðis, at í hvørjum samdøgri, roknað frá tí at arbeiðið byrjar, skulu arbeiðsfólk hava eina hvíldartíð, ið er minst 11 samfeldar tímar.

Undantak: Hvíldartíðin kann minkast til í minsta lagi 8 tímar í:

1) arbeiði í fiskavirkjum í háveiðitíðini,
2) árstíðarbundnum arbeiði í byggi- og verkayrki,
3) vaktarskifti á virkjum, sum hava vaktarskipan, tá partarnir á arbeiðsmarknaðinum semjast um tað,
4) inn- og uppskiping og tørvandi arbeiði, sum hartil hoyrir, so sum goymslu og pakkhúsarbeiði, og
5) arbeiði í landbúnaðinum.

**Arbeiðsfólk** mugu ikki regluliga arbeiða sunnu- og halgidagssam-døgur, uttan so at halgidagsarbeiðið er til samfelagsins frama ella er neyðugt fyri at varðveita virðir.

# Høvuðsreglur um arbeiðsumhvørvi



**Børn, ið ikki eru fylt 15 ár**, mugu ikki vera sett í arbeiði. Undantikið er tó lættari hjálpararbeiði fyri børn sum eru 13 ár ella eldri og mentanarligar framførðslur, tá foreldur geva loyvi.
**Arbeiðstíðin fyri ungfólk**, sum eru yngri enn 17 ár, má ikki fara upp um ta vanligu arbeiðstíðina fyri vaksin, sum arbeiða innan somu yrkisgrein.
**Ung undir 17 ár mugu ikki arbeiða meira** enn 10 tímar íalt um dagin og ikki um náttina millum midnátt og kl 6.00
**Ungfólk, ið ikki eru fylt 18 ár**, skulu hava eina samlaða hvíldartíð, sum er í minsta lagi 12 tímar um samdøgrið. Nevnda hvíldartíð skal vanliga fevna um tíðarskeiðið millum kl. 22.00 á kvøldi og kl. 05.00 á morgni.

**Fleiri serreglur eru,** sí §§ 49 og 50 í lógini https://logir.fo/Logtingslog/70-fra-11-05-2000-um-arbeidsumhvorvi-sum-broytt-vid-logtingslog-nr-18-fra-8-mai#_edn1

# Á virkjum við 1-9 fólkum § 4

Sigmund Poulsen

**… ..eigur arbeiðið hjá virkinum, hvat trygd og heilsu viðvíkur, at fara fram soleiðis, at mest møguligt persónligt samband er millum arbeiðsgevaran og møguligar arbeiðsleiðarar, sbrt. § 20, og hini arbeiðsfólkini.**

Landsstýrismaðurin kann tó gera reglur um bygnaðin av einari trygdarskipan, har hetta verður hildið at vera

# Á virkjum við meira enn 9 fólkum § 5

Sigmund Poulsen

**….. skal arbeiðið hjá virkinum, hvat trygd og heilsu viðvíkur, samskipast.**

*Stk. 2.* Arbeiðsleiðarin fyri einum virkisøki skal saman við einum trygdarumboði skipa ein trygdarbólk fyri tað ávísa arbeiðsøkið.

*Stk. 3.* Har eitt álitisfólk er valt, kann hetta samstundis vera trygdarumboð. Eru fleiri álitisfólk innan sama økið, kunnu hesi sínámillum velja eitt trygdarumboð. Í øðrum førum velja arbeiðsfólkini eitt trygdarumboð fyri hvørt arbeiðsleiðaraøki til at virka í trygdarbólkinum. Trygdarumboðið umboðar arbeiðsfólkini í spurningum, sum viðvíkja trygdar- og heilsuviðurskiftum teirra.

*Stk. 4.* Tey arbeiðsleiðaraøki, sum hava bert fá arbeiðsfólk, ella hava bert fá arbeiðsumhvørvislig vandamál, kunnu frá Arbeiðseftirlitinum fáa undantak frá kravinum um serligar trygdarbólkar

# Á virkjum við meira enn 20 fólkum § 6

Sigmund Poulsen

**….. skal trygdarnevnd skipast.**

Á virkjum, har ein ella tveir trygdarbólkar eru, skulu limirnir í hesum bólki ella bólkum, saman við arbeiðsgevaranum ella einum umboði fyri henda, sum hevur ábyrgdina av virkinum, skipa trygdarnevndina, soleiðis at nevndin á virkjum við einum trygdarbólki fær 3 limir og á virkjum við tveimum bólkum fáa 5 limir.

Á virkjum, har fleiri enn tveir trygdarbólkar eru, velja trygdarumboðini sínámillum 2 limir og arbeiðsleiðararnir sínámillum 2 limir. Hesir 4 limirnir skulu so saman við arbeiðsgevaranum ella einum umboði fyri henda, sum hevur ábyrgdina av virkinum, skipa trygdarnevndina, ið soleiðis fær 5 limir. Trygdarnevndin skal fyriskipa, leiða, ráðgeva, kunna og hava eftirlit við tí trygdar- og heilsuliga arbeiðinum á virkinum.

*Stk. 2.* Eftirlitsmaðurin hjá Arbeiðseftirlitinum skal, tá hann vitjar virkið, hava samband við leiðsluna á virkinum, trygdarumboðini á staðnum, trygdarbólkarnar og umboð fyri trygdarnevndina. Tey ymsu trygdarumboðini skulu hava loyvi til at leggja fyri eftirlitsmannin hjá Arbeiðseftirlitinum allar teir spurningar, sum hava týdning fyri trygdina og heilsuumstøðurnar á virkinum

# Fráboðan av vanlukkum

Sigmund Poulsen

## ARBEIÐSUMHVØRVISLÓGIN

ÚR KUNNGERÐ NR. 14 FRÁ 24. JANUAR 1990 UM FRÁBOÐAN FRÁ ARBEIÐSVANLUKKUM.

Arbeiðsgevarin hevur skyldu til skjótast gjørligt **og í seinasta lagi 9. dagin eftir fyrsta fráverudag** hins skadda at fráboða arbeiðs-vanlukkur og eitringartilburðir, sum hend eru av arbeiði í tænastu hansara, sum umfatað er í omanfyri nevndu lóg, um so er, at vanlukkan ella eitringin hevur havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin.

Sjálvt um talan ikki er um nakra setanarskipan, hevur eigarin (brúkarin) av maskinum, tekniskum yrkisevnum v.m. somu skyldu at fráboða allar arbeiðsvanlukkur og eitringar, sum hendar eru av hesum tólum.

# Fráboðan av vanlukkum

Sigmund Poulsen

## ARBEIÐSSKAÐATRYGGINGARLÓGIN § 23

Ein og hvør tilburður, sum hildin verður tryggjaður sambært hesi lóg skal skjótast gjørligt og **í seinasta lagi 9 yrkadagar eftir hendingina** verða fráboðaður Vanlukkutryggingarráðnum.

Stk. 2. Um tilburðurin ikki er fráboðaður samsvarandi stk. 1, og skaddi ella sjúki 5 vikur eftir hendingina framvegis ikki er førur fyri í fullan mun at taka upp aftur vanliga arbeiðið, skal tilburðurin **innan 9 yrkadagar eftir hetta** verða fráboðaður Vanlukkutryggingarráðnum.

Stk. 3. Fyri vinnusjúkur, sbr. § 10 verður fráboðanarfreistin roknað frá tí degi, tann fráboðanarskyldugi gjørdist varugur við, at sjúkan kann vera treytað av arbeiðinum.

Stk. 4. …..

Stk. 5. Boðar tann fráboðanarskyldugi, sbr. § 24, ikki Vanlukkutrygg-ingarráðnum frá møguligum arbeiðsskaða, ella verður tilburðurin fráboðaður ov seint, kann tryggjaði ella avvarðandi hansara innan eitt ár eftir tilburðin kortini seta fram krav um veitingar sambært hesi lóg. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann ráðið síggja burtur frá 1 árs fráboðanarfreistini.   www.arb.fo

# Lógarreglur: Arbeiðskaðatryggingarlógin

Sigmund Poulsen

## LØGTINGSLÓG NR. 67 FRÁ 25. MAI 2009 UM TRYGGING MÓTI AVLEIÐINGUNUM AV ARBEIÐSSKAÐA

ENDAMÁL:

**§ 1.** Endamálið við lógini er at veita endurgjald til persónar, ið koma fyri skaða, ella teirra avvarðandi orsakað av óhappi í sambandi við útinnan av arbeiði.

# Arbeiðsskaðatryggingarlógin: Tryggingarskylda



**§ 11.** Hvør tann, sum í starvi hevur persónar, sum eru nevndir í §§ 2, 3 og 7, er arbeiðsgevari í lógarinnar týdningi og hevur **skyldu til at tryggja arbeiðsfólkið** móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, samsvarandi ásetingunum í hesi lóg, smbr. tó stk. 2, § 12 og § 15,

# Arbeiðsskaði – vanlukka og vinnusjúka

Sigmund Poulsen

**§ 8.** Við arbeiðsskaða í hesi løgtingslóg er at skilja vanlukka, sbrt. § 9, og vinnusjúka, sbrt. § 10, ið stendst av arbeiðinum ella teimum viðurskiftum, arbeitt verður undir.

**§ 9.** Við eina **vanlukku** er sambært hesi løgtingslóg at skilja ein persónskaði, ið er elvdur av einum tilburði ella eini ávirkan, sum hendir brádliga ella innan fyri 5 dagar.

**§ 10. Vinnusjúkur** eru sjúkur, sum eftir læknafrøðiligum og tøkniligum royndum eru elvdar av serligum árinum, sum ávísir persónsbólkar, orsakað av arbeiði teirra ella viðurskiftunum, arbeitt verður undir, verða ávirkaðir av í størri mun enn persónar uttan tílíkt arbeiði. Harumframt sjúkur, sum livandi fødd børn hava fingið í móðurlívi orsakað av arbeiði, móðirin hevði, ímeðan hon var við barn.

# Arbeiðsskaði – vanlukka og vinnusjúka

Sigmund Poulsen

*Vanlukkutryggingarráðið*

**§ 26.** Vanlukkutryggingarráðið tekur avgerð í málum um arbeiðsskaðatrygging sambært hesi lóg og í málum viðv. vinnusjúkum, hendar í sambandi við arbeiði, sbr. § 10.

*Ankestyrelsen*

**§ 35.** ….

*Stk. 2.* Avgerðir,sum Vanlukkutryggingarráðið tekur sambært hesi lóg, kunnu av tryggjaða, hansara avvarðandi, viðkomandi arbeiðsgevara, sjálvstøðugt vinnurekandi, viðkomandi tryggingarfelag, av landinum og av Vinnusjúkugrunninum kærast til Ankestyrelsen………..

# Arbeiðsskaðatryggingarlógin: Skaðaendurgjald



## Endurgjald:

1. Fyri **útreiðslur** í sambandi við skaðahendingina
   a) Heilivágur, venjing, hjálpitól o.l.
   b) Mist arbeiðsinntøka
   c) Endurgjald fyri ”sviða og pínu”
2. Dagpengar
3. Fyri varandi **mein**
4. Fyri mist **vinnuføri**

# Arbeiðsskaðatryggingarlógin: Skaðaendurgjald

Sigmund Poulsen

## 1. Endurgjald fyri útreiðslur í sambandi við skaðahendingina

**§ 44.** Er undir málsviðgerðini neyðugt við sjúkuviðgerð ella uppvenjing til tess at fáa best møguligan heilsubata, rindar tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 21, stk. 7, ella Vinnusjúkugrunnurin útreiðslurnar í tann mun, tað ikki áliggur føroyska heilsuverkinum, sjúkrakassunum o.ø, at rinda hesar útreiðslur……

# Arbeiðsskaðatryggingarlógin: Skaðaendurgjald

Sigmund Poulsen

## 2. Dagpengar:

**§ 46.** Dagpeningur vegna sjúku aftan á arbeiðsskaða ella vinnusjúku, sbr. § 10, stk. 1, verður umsitin og útgoldin av Almannastovuni sambært vanligu reglunum í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.

Verður ein ...arbeiðsskaðatilburður... seinni viðurkendur sum arbeiðsskaði ella vinnusjúka sambært hesi lóg, verður útgjaldingin av dagpeningaveitingini endurgoldin av tryggingarfelagnum ella landinum...

(Dømi um avleiðing av manglandi skaðafráboðan)

Sigmund Poulsen

## 3. Endurgjald fyri varandi mein:

**§ 55.** Hevur tryggjaði fingið varandi mein av arbeiðsskaðanum ella av vinnu-sjúkuni, sbr. § 10, stk. 1, verður veitt ein skaðabót, um meinstigið er 5% ella hægri.

*Stk. 2.* Meinstigið verður ásett við grundarlagi í læknafrøðiligari meting um slagið og støddina av arbeiðsskaðanum og við atliti at, hvussu hesi hava ávirkað persónligu tilveruna hjá viðkomandi.

**§ 57.** Skaðabót fyri varandi mein verður ásett til eina ávísa peningaupphædd og útgoldin í einum.

https://logir.fo/Frabodan/44-fra-15-05-2024-um-javning-av-endurgjaldseindum-sambaert-lov-om-erstatningsansvar-og-lov-om

# Arbeiðsskaðatryggingarlógin: Skaðaendurgjald

Sigmund Poulsen

**Hvussu verður endurgjald fyri varandi mein ásett?:**

https://www.retsinformation.dk/eli/retsinfo/2017/9086#id93d9f2cc-6f38-4467-a6d3-cdbea779997b

Ménberegner | AES.dk

# Arbeiðsskaðatryggingarlógin: Skaðaendurgjald

Sigmund Poulsen

## Endurgjald fyri mist vinnuføri

**§ 47.** Hevur arbeiðsskaðin ella vinnusjúka sbrt. § 10, stk. 1, ið er góðkend sbrt. § 10, stk. 2, havt við sær minkandi førleika hjá tryggjaða ella persóni, sum er umfataður av Vinnusjúkugrunninum, at forvinna sær inntøku við arbeiði, hevur viðkomandi rætt til endurgjald fyri mist vinnuføri. Endurgjald verður tó ikki veitt, um óvinnuførið verður ásett til minni enn 15%.

*Stk. 2.* Tá mett verður um miss av vinnuføri, skal leggjast uppfyri, um tryggjaði ella persónur, sum er umfataður av Vinnusjúkugrunninum, hevur møguleika at útvega sær inntøku við tílíkum arbeiði, ið rímiligt er at krevja av honum eftir førimuni, útbúgving, aldri og møguleikunum fyri vinnuligari endurútbúgving og uppvenjing.

# Arbeiðsskaðatryggingarlógin: Skaðaendurgjald

Sigmund Poulsen

## Hvussu verður endurgjald fyri mist vinnuføri ásett?

**§ 49.** Hevur tryggjaði mist alt vinnuførið, verður veitt eitt endurgjald, ið svarar til 80% av ársløn hansara, roknað sambært § 42. Hevur tryggjaði partvíst mist vinnuførið, verður endurgjaldið lækkað lutfalsliga.

**§ 50.** Endurgjald fyri mist vinnuføri verður veitt sum framhaldandi árlig veiting, uttan so, at veitingin verður roknað um til eina ávísa peningaupphædd sambært § 51……….

# Arbeiðsskaðatryggingarlógin: Skaðaendurgjald

Sigmund Poulsen

## Hvussu verður endurgjald fyri mist vinnuføri ásett?

**§ 51.** Er óvinnuførið ásett til 50% ella lægri, verður tann framhaldandi árliga endurgjaldsveitingin roknað um til eina ávísa peningaupphædd. Er óvinnuførið ásett til 51% ella hægri, kann endurgjaldsveitingin undir serligum umstøðum og eftir áheitan frá tí, ið hevur rætt til upphæddina, roknast um til eina ávísa peningaupphædd. Fyribils endurgjald eftir § 48, stk. 4 kann tó í ongum førum roknast um til peningaupphædd.

Lógasavn (logir.fo)   erstatningsansvarsloven

https://logir.fo/Frabodan/44-fra-15-05-2024-um-javning-av-endurgjaldseindum-sambaert-lov-om-erstatningsansvar-og-lov-om